skemt





# Legg tær í geyma

Geymin er blivin ein trúfastur fylgisneyti hjá nútímans menniskjanum. Lítla amboðið, sum kann goyma stóra mongdir av data, er hent at hava uppi á sær. Tað eru eisini framleiðarar, sum royna seg við øðrvísi geymum, og tað eru tað komin fleiri stuttligir geymar burturúr.

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

**Ja, tá er trupult at vinna**
Í heila tikið kann sigast, at B36-arnir spældu fram eftir vøllinum, meðan HB spældi aftureftir, og tí var tað B36, sum vann dystin
Dimmalætting

**Eitt var politiskt friðskjól**
Útlendsk skip, sum liggja við bryggju í Føroyum, verða eitt friðskjól hjá føroyskum roykjarum, tá nýggja roykilógin kemur í summar.
Útvarpið

**Próvtøka í svimjihyin?**
Frá Stranda skúla. Vegna próvtøku verður eingin almenn svimjing í dag. Stranda skúli.
Útvarpið

**Eitt slag av prioritering**
Bant ølkassan í bilbeltið
Olivant

**Neyvan Jan Højgaard**
Úr Fiskimannafelagnum umborð á Carlton
Olivant

**Hugaligt tarnagass**
Fekk Mercedes fyri at vaska skógvar
Olivant

# Hvør bestemmar nú?

Einaferð var hann heimsins mætasti maður – forseti í USA. Nú brúkar Bill Cinton mest tíðina til at renna í hølunum á konu sínari, Hilary, sum vil verða næsti forseti í sambandsríkinum. Hóskandi revsing hjá Bill, sum plagdi at renna eftir øðrum konufólki í sinari tíð í Hvítu Húsunum.





# Her er okkurt galið

Bretski William prinsur blandaði seg upp í, tá ið hann vitjaði eina fótbóltsvenjing á einum skúla í Blackburn í farnu viku. William var ikki júst í klæðum til at spæla fótbólt – men kanska brúka tey kongaligu slík klæði, tá tey íðka ítrótt.

# Flúgvandi formil 1



Soleiðis sá tað út, tá ið Formil 1 kapkoyring var í turkiska býnum Istanbul farna vikuskiftið. Italski Fisichella fer flúgvandi upp um japanska Nakajima, og stóri spurningurin er, um tú vildi siti í tí ovara ella niðara bilinum, tá ið hetta hendi. Mynd: Polfoto